ÚT AT KOYRA

## Astra Cabriolet



Fyrst í mars verður ein bilaframsýning í Geneve, har ein nýggjur Opel Astra Cabriolet verður sýndur fram. Fýra motorstøddir verða at velja í millum. Bilurin er teknaður hjá Ber-tone í Italien.

*Kelda: Motor Magasinet*

## Volvo SCC



Á bilaframsýningini sum er í Detroit í hesum døgum, er trygdarkonseptbilurin Volvo SCC, sum t.d. hevur ein automatiskan følara, sum við at finna eyguni á bilføraranum, stillar førarasetrið soleiðis at bilførarin altíð hevur tað besta útsýnið.

*Kelda: Motor Magasinet*

## BMW í Onglandi



Stóri eftirspurningurin eftir BMW-bilum um allan heim, hevur við sær at ein stór BMW-motorverksmiðja, fyri fýra milliardir krónur, er sett upp í Hams Hall í Onglandi, har 400.000 motorar verða framleiddir árliga.

*Kelda: Motor Magasinet*

# VR-Bilar

## – nýtt Volvo og Renault umboð

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Fríggjadagin 9. februar verður móttøka í eini nýggjari fyritøku við Hoyvíksvegin í Havn. Tað er Sverri Steintún, ið saman við øðrum hevur stovnað fyritøkuna Sp/f VR-Bilar, sum umboðar bilmerkini Volvo og Renault.




*Sverri Steintún er stjóri, og ein av partaeigarunum í nýggju fyritøkuni við Hoyvíksvegin.*

### Nýggj fyritøka

Nýggja fyritøkan heldur til í somu hølum við Hoyvíksvegin, sum Brøður Petersen Bilar, ið áður seldu somu bilmerkir, hildu til. Stjóri í fyritøkuni er Sverri Steintún, ið er ein av partaeigarunum í nýggju fyritøkuni. Í longri tíð hevur verið arbeitt við at seta hølini í stand, so teir kunnu bjóða kundunum inn í hugnaligt og kundavinarligt umhvørvi.

### Vælútgjørdir verkstaðir

Bilverkstaðirnir eru býttir upp í tvær deildir, har ein verkførari er á hvørjari deild. Á lastbiladeildini er Torleif Nón verkførari, og á persónbiladeildini er tað Jóhann Wolles. Báðir verkstaðirnir eru vælútgjørdir, og kunnu gera alt arbeiði, frá at skifta dekk og olju, til at testa motorar og aðra útgerð við nýggjastu elektronisku tøknini. Eisini hava VR-Bilar eina sproytikabina, so teir eisini kunnu gera alt lakkeringsarbeiði.

### Hjálparbil í meginøkinum

Ætlanin er eisini at fáa til vega ein vælútgjørdan hjálparbil, sum hevur alla neyðuga útgerð til at veita bráðfeingis hjálp til lastbilar, bussar og entreprenørar, sum ikki fáa arbeitt, tí teir eru uppsteðgaðir ella hava annan akuttan tørv. Hesin bilur skal dekka alt meginøkið. Eykalutagoymslan verður eisini í tveimum deildum, har ein goymslumaður verður til persónbilar og ein til lastbilar og bussar. Hetta verður gjørt fyri at tryggja eina vælvirkandi goymslu við øllum vanligum slitlutum og tí, sum annars krevst á eini nútímans eykalutagoymslu til Volvo og Renault bilarnar.

### Móttøka 9. februar

Nýggir bilar verða eisini tiknir heim, har fleiri spennandi nýggj modell, so sum Volvo S60 og V70, eru við, eins og ein heilt nýggjur Renault Laguna kemur á marknaðin í næstum. Á fyritøkuni starvast 11 fólk, harav nakrir mans hava arbeitt hjá Volvo ein stóran part av lívinum.

Móttøka verður fríggjadagin 9. februar frá kl. 14.00, har møguleiki verður at hitta nýggju eigararnar, eins og starvsfólkini, og fáa eitt gott bilprát. Umboð fyri Volvo í Danmark vera eisini til staðar.




*Volvo bussur á lastbilaverkstaðnum. Menninir eru frá vinstru Kári Olsen, Ove Davidsen og Torleif Nón, verkførari.*



*Jóhan Wolles verkførari á persónbiladeildini, saman við stjóranum Sverra Steintún, í hugnaligu hølunum á bilasøluni.*



ÚT AT KOYRA

# ChipsAway

## – amerikansk bilaumvælingarskipan á Sandvíkahjalla

**Fleiri hava ivaleyst lagt til merkis ein hvítan Toyota Hiace vøruvogn við ChipsAway búmerkjum á síðuni, uttan at vita hvat hetta stendur fyri. Loysnin á hesum spurningi er nú at finna á Sandvíkahjalla, har Óli Joensen hevur innrættað sær hølir til at umvæla smáskaðar á bilum eftir amerikansku ChipsAway skipanini**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

ChipsAway skipanin er framleidd í USA, har hon bleiv tikin í brúk í 1986. Tað vísti seg skjótt, at hetta varð ein succes, og í 1994 bleiv skipanin útflutt til Onglands, haðani hendan skipan verður býtt út um allan heimin. Danska deildin, ChipsAway Skandinavia A/S, hevur øll rættindi til skipanina í Skandinavien, haðani Óli Joensen og hjálparmaður hansara, Sverri Poulsen, hava fingið sína útbúgving innan ChipsAway, og eru góðkendir av teimum. Navnið á føroysku deildini er ChipsAway Føroyar Sp/f.

ChipsAway er eitt eindømi innan lakkumvælingar, sum við hjálp av serframleiddum lakki og tøkni, umvælir lakkskaðar, skøvur í lakkeraðum kúfangarum, rustplettir og líknandi, uttan at allur skermurin ella kúfangarin skal lakkerast. Við hjálp av hesi serligu tøkni, verður skaðin viðgjørdur i dýpdini, og einans eitt lítið umráði verður viðgjørt, uttan at samankomingarnar síggjast. Umvælingarnar verða gjørdar uttan at avmontera teir skaddu lutirnar, eins og ongar avmarkingar eru hvat viðvíkur slagi av lakki. Skipanin tekur eisini hædd fyri, um lakkið er gamalt og falmað.

### Trim-Fix

Trim-Fix er ein effektiv kosmetisk loysn til skaðar á inntrekki í bilinum, so sum plastik, venyl, kunststoff og leður. Eisini til umvæling av plastkúfangarum, sum ikki eru lakkeraðir. Trim-Fix skipanin viðger evni við flótandi plastiktilfari, sum kann tónast í teimum røttu litunum. Um til dømis eitt hol er í setrinum av eini sigarettglóð, kann tað gerast so væl aftur, at lítið og einki sæst til skaðan. Eisini um hol er eftir eini telefon, mikrofon ella »Leysur« skelti á hýruvognum o.t.

### Upp til 50% at spara

ChipsAway verkstaðurin hjá Óla Joensen heldur til á Sandvíkahjalla, aftan fyri tann stóra grøna bygningin, sum Føroya Fiskasøla bygdi til goymslubygning, og Tórshavnar Skipasmiðja eigur í dag. Tað hevur ikki verið lætt at fáa hóskandi hølir í Havn, men Tórshavnar Skipasmiðja hevur víst Óla vælvild, soleiðis at ChipsAway hevur kunnað innrættað sær hølir á økinum hjá teimum. Ætlanin er at flyta nærri býnum tá høvi býðst.

Við at koyra ein bil við smáskaðum til ChipsAway verkstaðin, ber til at spara millum 30 og 50 prosent av tí, sum ein slíkur skaði annars hevði kostað at umvælt. Eisini verða givin pakkatilboð, sum fevna um umvæling av smáskaðum og steinsløgum, eins og bilurin verður poleraður. Tey, sum hava biltrygging við stórari sjálvsábyrgd, kunnu, um skaðin ikki er ov stórur, umhugsa at royna ChipsAway skipanina, sum kann geva eitt tilboð, sum møguliga er væl lægri enn sjálvsábyrgdin. Tá slepst undan, at skaðin verður meldaður til teirra tryggingarfelag. Umleið 75 prosent av øllum smáskaðum kunnu umvælast hjá ChipsAway.




*Óli Joensen og Sverri Poulsen frammanfyri ChipsAway verkstaðin, ið er innrættaður til endamálið. Óli hevur fingið góða hjálp frá vinum og kenningum í hesum arbeiðinum.*

### Góð tænasta

Hjá teimum, sum búgva í Havn, verður tænastan góð. Tá kundin kemur við bilinum, verður hann koyrdur heimaftur, og bilurin verður leveraður aftur eftir viðgerðina. Arbeiðið tekur vanliga 2 til 3 tímar, ella upp til ein dag, alt eftir hvussu umfatandi tað er. Seinni er ætlanin at fara út á bygdirnar við umvælingunum. Ætlanin er at arbeiða í leigaðum hølum, tá fleiri í somu bygd ella øki, hava bílagt ChipsAway umvælingar. Annars eru góðir møguleikar hjá teimum, sum kortini skulu til Havnar í øðrum ørindum, at koma við bilinum. Umvælingarnar taka ikki langa tíð, og býbussar koyra nú eisini niðan á Sandvíkahjalla.

Arbeiði sum verður gjørt á Sandvíkahjalla er fult á hædd við tey allarbestu umvælingararbeiðini sum verða gjørd. Vit vóru til staðar, tá Óli umvældi frontplátuna á einum Ford Escort. Har var alt so væl úr hondum greitt, at tann, sum ikki veit hvar á bilinum, tann umvældi skaðin var, hevur ongan møguleika at síggja hvar hann hevur verið. ChipsAway veita vissu fyri, at teirra umvælingar halda bilin út. Telefonnummarið hjá ChipsAway Føroyar Sp/f er 213323, og er eisini at finna á heimasíðuni: www.chipsaway.dk




*ChipsAway verkstaðurin er aftanfyri bygningin hjá Tórshavnar Skipasmiðju, næsti bygningur aftaná Litaval á Sandvíkahjalla*



*Óli Joensen er her í holt við at umvæla ein skaða eftir ChipsAway skipanini*